www.torshavn.fo



# Skal tín fyritøka hava hetta útsýnið?

**Vinnugrundøki við frálíkum útsýni av fremstu røð á Boðaneshamri, til sølu.**

Tórshavnar kommuna lýsir við hesum matrikul nr. 1322 h, Tórshavn til sølu.

Talan er um byggibúgvi vinnugrundøki sum er til støddar 2.588 fermetrar og liggur á Óðinshædd.

Grundøkið liggur sera væl fyri sum vinnugrundøki, og hevur sera gott útsýni.

Umhvørvið er frítt og friðarligt.

Grundøkið liggur í øki B10 í 3. grundumráði, og verður víst til serstaka byggisamtykt nr. 7, eind F, sum er galdandi fyri part av Tórshavnar kommunu.

Sambært áseting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, er økið kannað miðstaðaendamálum, skrivstovuendamálum, heilsuendamálum o.t. og til virksemi, ið hevur samband við hetta.

**KOSTNAÐUR**
Vinnugrundøkið verður selt til hægstbjóðandi, men verður ikki tikið móti boðum undir kr. 2.400.000,00.

**FREIST**
Áhugaðir keyparar skulu boða kommununi frá í seinasta lagi fríggjadagin 5. februar 2010 við at senda eini skrivlig boð í afturlætnum brævbjálva, umframt eina váttan frá peningastovni um tøka fígging til:

Tórshavnar kommunu
Postsmoga 32
Tórshavn
Faks 30 20 11
e-post torshavn@torshavn.fo

Brævbjálvin skal verða merktur uttaná:
Boð uppá vinnugrundøki á Boðaneshamri, umframt navn á boðgevara.

**FLEIRI UPPLÝSINGAR**
Eru spurningar, ber til at venda sær til Løgdeildina á telefon 30 20 10.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

---

Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04 N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00




Thomas Dam búnýti

---




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til telefonmóttøkuna at byrja skjótast gjørligt. Talan er um parttíðarstarv frá kl. 10 til kl. 14 hvønn dag.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Ábyrgd av telefonmóttøkuni
- Avgreiðslu av viðskiftafólki í telefonini
- Hjálp við hóskandi uppgávum frá øðrum deildum
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta við onnur. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Innlendismálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á telefon 350 428. Umsóknir við avritum av møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi áðrenn **25. januar 2010.**

*Akstovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

SENDISTOVAN

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo